# Kjak



Helena Samuelsen

## Rósa ruddar

*Nógv órudd hevur hópað seg upp á arbeiðsleiðini hjá Rósu Samuelsen, landsstýriskonu. Hon er farin at rudda. Og vit eru nógv, sum stuðla henni*

### Dømi 1

Á nøkrum stovnum fyri gomul og brekað fáa fólk pensión, á øðrum fáa tey lummapengar. At mannamunur verður gjørdur á fólki í somu støðu, er ikki virðiligt. Rósa hevur sæð tað óvirðiliga í hesum.

### Dømi 2

Sálarliga sjúk og sálarliga menningartarnað fólk hóska ikki væl saman. Fólkini skilja ikki hvør annan. Hetta er einki nýtt. Í sjeytiárunum gjørdi Árni Olsen, yvirlækni, hetta greitt. Á Eirargarði 14-16 kom í 1980 ein bústovnur til sálarliga menningartarnað fólk. Tað var tikið atlit til tey fólk, sum komu har at búgva. Men tað var eisini tikið atlit til tey sálarliga sjúku, sum frammanundan vóru á økinum. Í dag er øðrvísi. Eitt stórt hvítt skelti á veg inn í húsini á Eirargarði 14-16 vísir á, hvør húsast har. Skeltið sigur frá, at tað hvørki er tikið atlit til tey menningartarnaðu ella sjúku. Alt er samanblandað. Rósa má fara at rudda.

### Dømi 3

Í Sandavági eru tvey sambýli, har sálarliga sjúk fólk búgva. Men eingin vardur verkstaður. Í Sørvági er vardur verkstaður til sálarliga menningartarnað fólk. Nú hava øll fingið arbeiðstilboð á sama verkstað. Rósa hevur varnast tað og hevur ætlað sær at rudda har.

### Dømi 4

Tey fólk, sum í dag eru í nítiárunum, høvdu ikki sítt egna kamar sum børn, heldur svóvu fleiri systkin í somu song. Vit, sum í dag eru í sjeytiárunum og standa og banka upp á dyrnar á ellisheimum, fara ikki at vera so væl nøgd við alt sum ættarliðið undan okkum. Vit eru von við rásarúm, egna teldu, sjónvarp osfr. Minstamark verður, at vit fáa egið kamar, tá umstøðurnar verða so, at vit mugu flyta á stovn at búgva. Rósa er farin til verka. Eitt búfólk í hvørjum kamari.

Onnur dømi eru, men lat hetta vera nóg mikið.

### Niðurstøða

Har nógv órudd liggur, er óarbeiðsligt. Tí má Rósa Samuelsen rudda fyri sær og fáa arbeiðsfrið, annars fær hon einki burturúr.

---



Heðin Mortensen
*borgarstjóri*

## Lokalpolitisk herferð í Norðlýsinum

Í farnu viku varð Norðlýsið borið í hvørt hús. Vit, sum altíð við størsta áhuga fylgja við, hvussu gongst í Norðoyggjum, serliga hjá vinnulívinum, sóu beinanvegin, at talan var ikki um eitt vanligt Norðlýsi. Talan var um eitt propagandablað fyri leiðsluna í Klaksvíkar kommunu og nøkur sera snævurskygd, lokal sjónarmið. Blaðið var samstundis í høvuðsheitum fíggjað av lýsingum frá kommununi og kommunalum stovnum og harvið ein avbera sjáldsom ávís. Seinni er so komið fram, at blaðið var eitt beinleiðis átak frá leiðsluni í Klaksvíkar býráð.

Eg skal ikki gera meira burturúr prinsippinum við slíkum blað, bert vísa á, at er tað soleiðis, mann vil branda lokalsamfelagið, so tænir ein slík landsfevnandi herferð átakinum til lítlan sóma, tí innihaldið er so lokalt, at Føroya fólk helst fær ta fatan, at fyri hesi finst eingin heimur uttan fyri lokalu ostaklokkuna í Klaksvík.

### Útjaðaramenning?

Mesta skrivingin í hesum blað er ein uppgerð við høvuðsstaðin, hóast Havnin sum kommuna ella høvuðsstaður einki hevur við viðgjørdu málini at gera. Blaðið átalar "almennum starvsfólkum og journalistum í Havn" (hóast mong av hesum eru klaksvíkingar og norðingar), og nú hava "allir partar" í høvuðsstaðnum allierað seg í eini herferð móti øllum uttan fyri Havnina. Hetta er niðurstøðan eftir eitt fakligt álit, sum verður blankt avvíst, tí tað er skrivað av "almennum starvsfólkum í Havn".

Slík skriving er sera óheppin, tí tá høvuðsargumentið móti eini fakligari avgerð er, at tey, sum hava tikið hana, búgva í Havn, so kann úrslitið bara blíva runukast av tí mest primitiva slagnum.

Samfelagsliga høvuðsendamálið kann ikki vera at lívga ávísum økjum, men at vit sum samfelag fáa best møguligar tænastur fyri minst møguligar skattakrónur – altso at vit taka samfelagsbúskaparlig og faklig atlit. Í einum burðardyggum regionalpolitikki eigur endamálið at vera at leggja aftrat verandi heldur enn at taða sundur fyri at taða sundur uttan atlit til dygd fyri samfelagið alt. Men tað er nóg trupult at hava dygdartænastur í einum fáfólkaðum landi sum okkara sum er, men at hava dupult og trýdupult av øllum er ógjørligt og hevur einki við útjaðaramenning at gera.

### Útjavning?

Ein afturvendandi pástandur, hesaferð í oddagreinini, er, at útjaðaraøkini vikna, "tí tey gjalda alt ov nógv til tað kostnaðarmikla høvuðsstaðarøkið". Tað er, sum at hesin pástandur á ein ella annan hátt heldur lív í runukastingini. Pástandurin er bara ikki sannur og ongar kanningar stuðla hesum uppáhaldi. Eitt "argument" skal vera, at almenn størv eru fólksins ogn og tí ein pulja, býtast skal javnt av desentralt. Tí hava vit einki ímóti, um býtið er neyðugt og rættvíst. Men so mugu vit býta fiskiríkidømið eftir somu prinsippum. Eg ivist, um tað kravið hevði verið so væl móttikið.

Vit vita samstundis, at fleirtalið av ungdóminum vil útbúgva seg í høvuðsstaðnum. Útbúgvingarliga kappast vit ikki við Klaksvíkina, men við útlandið. Vit vita frá kanningum, at yvir sjeyti prosent av teimum, sum lesa uttanlands, men ætla sær heimaftur, ynskja at búgva í Havn. Vit eiga tí at gera okkara samfelag so attraktivt sum til ber fyri tey, sum búgva her, eins og fyri tey sum kunnu hugsast at búseta seg her. Í hesum arbeiði skal høvuðsstaðurin ikki kappast við Klaksvíkina. Høvuðsstaðurin skal hinvegin tryggja, at Føroyar kunnu kappast við metropolarnar í grannalondunum um hesar fortreytir – og soleiðis eisini um tey komandi ættarliðini.

### Høvuðsstaðurin á odda

Vit eiga øll høvuðsstaðin. Hann eigur avgerandi leiklutin at ganga á odda í vinnuligu, búskaparligu, mentanarligu og sosialu menningini í Føroyum, og hann tænir øllum føroyingum. Vit vilja tí eisini samstarva við landspolitikkarar, aðrar kommunur og allar føroyingar um at menna samfelagið.

Ágangurin á Havnina vísir okkum fyrst og fremst, at mong als ikki hava skilt boðskapin um, at tá Havnin hevur tað gott, hevur restin av Føroyum tað gott. Er ikki framgongd og vøkstur í Havnini, so er afturgongd í Føroyum.

Skulu Føroyar yvirliva og mennast sum land og standa seg í altjóða kapping eftir vitan og tilfeingi, er neyðugt at sleppa stuttskygdum ætlanum sprotnar úr lokalum ørvitiskapi, sum fyri samfelagið kosta tað tvífalda og tvingar okkara ungu fólk av landinum at nema sær útbúgvingar. Og tað sum verri er, eftir lokna útbúgving er torført at fáa nøktandi fakligar avbjóðingar, tí hesar finnast í lítlan mun í smáum desentralum eindum.